Míni royndir av Orðabókagrunninum við Kára á Rógvi sum formanni

KÁRI DAVIDSEN

Triði partur

Tann fyrsti, sum setti meg í samband við henda grunn, var Hjalmar Petersen, sum var nevndarlimur í Orðagrunninum um tað mundið. Hann vísti á, at Orðabókagrunnurin var áhugaður í at geva tað týsk-føroyska orðabókahandrit út.

Fyrsti fundur millum meg og Orðabókagrunnin var fyrst í januar 2007, har báðir partar greiddu frá ymiskum viðurskiftum, sum lýstu støðuna hjá hvør øðrum. Tað gjørdist skjótt greitt, at Kári á Rógvu var nýggjur á fremmandamálsøkinum. Hann greiddi m.a. frá, at grunnurin skuldi vera so illa fyri fíggjarliga, at tað var ikki gjørligt, at grunnurin kundi geva alt handritið út (uml. 120.000 leitorð), so ein skúlaútgáva (60.000 leitorð) var umrødd og góðtikin av mær, men sáttmálin, sum var ætlaður, at eg skuldi ganga undir, var eitt gamalt útkast av einum ph.d-sáttmála frá 2005, sum skuldi verða grundarlagið undir sáttmálanum fyri orðabókaverkætlanini. Hetta kundi eg undir ongum umstøðum góðtaka. So varð farið undir at snikka nýggj uppskot til sáttmála, har Jógvan Elias Winther Poulsen var sakførari fyri Orðabókagrunnin. Eg skilti ongantíð, hví henda sakførarastova var við, tí Kári á Rógvi er jú sjálvur løgfrøðingur, og hann hevur sum tílíkur 2007 tugt og tanlað 8 uppskot til, sum hvørt hevur verið jánkasligari enn tað undanfarna. Dømi: ph.d sáttmálin skjeyt upp, at eg skuldi skriva skúlaversjónina sum magistari á 1. stigi við viðbótum og eftirløn, so at samlaða mánaðarlønin gjørdist 28.032.00 kr. Henda upphædd x 36 er so 1.009.175,76 kr. fyri skúlaorðabókina. Eg kundi ikki góðtaka hesa mánaðarløn, tí eg hevði snevilin av, at aðrar orðabøkur frá Mentamálaráðnum (= MMR) høvdu fingið heilt aðrar upphæddir fyri líknandi arbeiði. Hesin illgrunin skuldi vísa seg seinni at vera sannur. Hetta verður viðgjørt í seinni grein. Síðan koma sáttmálauppskotini bóltandi høvd í høvd við smærri broytingum, tó soleiðis, sum Kári á Rógvi alla tíðina visti, at tey fóru ongantíð at verða góðtikin av mær. Míni argument vóru t.d. 1) ph.d-sáttmálauppskotið, 2) Kári á Rógvi krógvaði seg aftan fyri Mentamálaráðið, sum jú hevur stuðlað øðrum orðabókahandritum 100%, men mítt orðabókahandrit kundi so ikki stuðlast undir somu treytum, og sum frá líður 3) sáttmálin, sum skal undirskrivast, hevði allatíðina ein triðja part, Mentamálaráðið, við, sum Kári á Rógvi nýtti at skáka sær undan sáttmálanum við, og eg gjørdi vart við í viðmerkingum til sáttmálauppskotini, at eg ikki kundi góðtaka, at ein triði partur er umrøddur sum avgerandi jokari, og at hann framhaldandi var við í sáttmálauppskotinum, og Kári lætst sera blíður og skrivar í telduposti t. 27. mars 2007 - 09:28: ”Kæru tit. Jú hetta sær bara væl út. Vit skriva MMR burturúr og stramma upp.” Mundi ikki ein og hvør roknað við, at nú var hesin triði partur burtur úr sáttmálanum. Men hvat stendur í nýggja sáttmálauppskotinum undir ”Stuðul til útgávu § 5. Orðabókagrunnurin hevur fingið tilsagdan stuðul frá triðjaparti til útgávuna, og kann siga sáttmálan upp, um hesin stuðul óvæntað ikki kemur grunninum í hendi.” Og soleiðis heldur Kári á Rógvi fram við løgfrøðiligu snildum sínum, tí at MMR og triðipartur er ein og sami løgfrøðiligi persónur, og 4) tað allarringasta nú hava partarnir mist alt álit hvør á annan, tí undir ”Handrit og freist…” stendur nú: ”Um orðabókagrunnurin ger av kortini ikki at geva orðabókina út, skal grunnurin handa høvundanum handritið og alt tilfarið, sum grunnurin hevur móttikið frá høvundanum, aftur.”

Harragud Kári á Rógvi, heldur tú meg vera so bláoygdan, at eg kann ganga undir hesar treytir, tí tú vildi jú hava bókina teldutøka, og tað tekur nøkur fá sekund at kopiera sær nøkur eintøk av teldu-útgávuni, so látast sum, at alt tilfarið er latið rithøvundanum aftur. Nei, eg veit fullvæl, hvør tín ætlan var. Hevði tú fyrst eitt eintak, so kundi ein av tínum fylgisveinum farið undir sama verk – fyri lítið og lætt, og Orðabókagrunnurin hevði havt megnað eina allneyðuga orðabók, sum hann ikki hevur gjørt tað undir tíni formanstíð. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, so var Hjalmar Petersen settur sum eftirlitsfólk av týskføroysku orðabókini, men hann góðtók eg, tí honum havi eg einki ímóti. Men allar hinar orðabøkurnar hava tær havt nakað góðskueftirlit, hví skal tann týsk-føroyska orðabókin hava serligar treytir?

Framhald

Upptakið eftir ábyrgdarloysið krevur seriøsar broytingar

HØGNI HOYDAL

Nýggja føroyska stjórnin er komin til upptakið eftir ein grundleggjandi skeivan fíggjar- og búskaparpolitikk, sum sambands- og fólkaflokkurin nú støkka undan og tváa uppí eina samgongu, iðbert hevur havt góðar tveir mánaðir at rudda

Tað nyttar lítið at gerast firtin inn á ábyrgdarleysu gerðirnar og útsagnirnar hjá formonnunum í sambands- og fólkaflokkinum, nú eitt uppskot til fíggjarlóg er gjørt fyri 2008 – ið bert kemur at galda í hálvt ár.

Hevði kortini eina lítla vón um, at teir – ella um ikki annað fjølmiðlarnir – fóru at halda seg bert eitt lítið sindur til sannleikan í umrøðuni av fíggjarlóg, støðuni í almenna húsarhaldinum og búskapinum sum heild.

Men har fór eg skeivur. Uttan nakað samvitskubit at síggja til, sleppa formenninir í sambands- og fólkaflokkinum nú í fjølmiðlunum at geva nýggju føroysku stjórnini skuldina fyri upptakið av teirra egnu gerðum. Neyvan finst eitt vask í hesum landi, ið megnar at bera so nógvari handatváan.

Beinagrindir í skápunum

Nú vit lótu skápini upp í Fíggjarmálaráðnum fyri tveimum mánaðum síðani, duttu beinagrindirnar út í hópatali – og enntá í størri tali, enn vit høvdu roknað við, hóast vit hava ávarað staðiliga um gongdina seinastu fýra árini.

Bara framskrivingarnar av verandi virksemi og kostnaðurin fyri tey uppskot, ið sambands- og fólkaflokkurin samtyktu beint upp undir løgtingsvalið, geva eykaútreiðslur uppá knapar 300 mió. krónur. Var valið ikki útskrivað, vóru rokningarnar helst fleiri hundrað mió. hægri.

Hartil hava vit staðfest meirnýtslur í 2007 fyri omanfyri 60 mió. krónur. Broytingarnar í skattalættanum og nøkur nýggj avgjøld, sum sambands- og fólkaflokkurin avtalaðu at koma í gildi 1. januar 2008, men sum ikki vórðu samtykt, elva til, at vit missa aðrar 40-50 mió.kr. á inntøkusíðuni. Og harafturat vaksa útreiðslurnar til rentustuðul í stórum.

Við hesum fortreytum hevur tað í veruleikanum verið eitt torført tak at røkka einum úrsliti, ið gevur avlop uppá góðar hálvthundrað milliónir krónur.

Ongin fíggjarpolitikkur fordur

Vit kunnu bert staðfesta, at tá vit fóru úr Tinganesi í 2003 vóru kassarnir fullir og meira enn 2 milliardir spardar upp í Landsbankanum og skuld niðurgoldin í stórum. Tamarhald var á fíggjar- og búskaparpolitikkinum og kósin var løgd til ein sjálvberandi búskap. Avtalur vóru við kommunurnar. Langtíðarætlan varð gjørd fyri íløgur. Tamarhald var á inflasjón og prísvøkstri. Og stórt avlop á bæði handils- og gjaldsjavna.

Nú vit koma aftur er støðan hendan: Onki er spart upp, men bara brúkt av uppsparingini. Avtalur við kommunurnar sleptar. Ongin íløguætlan. Stórar meirnýtslur í almenna búskapinum. Metstórt hall á handilsjavna – og helst gjaldsjavna við. Inflasjón og prísvøkstur.

Skattalættar og blokkstuðul

Skattapolitikkurin hjá sambands- og fólkaflokkinum hevur elvt til hesa gongd, umframt at ongar bygnaðarbroytingar ella nøkur tiltøk yvirhøvur eru gjørd, ið kunnu brynja samfelagið til framtíðina.

Hetta hevur formaðurin í Búskaparráðnum ritað í stein herfyri. Trupulleikin er, at alt ov nógvir pengar eru sprændir út í nýtslu samstundis – frá bæði bankum, privatum og tí almenna.

At sambandsflokkurin so tosar um meira blokkstuðul, er burtur úr vón og viti. Varð blokkstuðulin ikki skorin, høvdu enn fleiri pengar verið sprændir inn og støðan enn truplari.

Ein undantaks-fíggjarlóg

Komin hálvt inn í fíggjarárið, ber sjálvsagt ikki til at fremja grundleggjandi bygnaðarligar broytingar, men tað arbeiðið er sjálvsagt farið í gongd fyri fíggjarlógina 2009.

Arbeiðið við hesi undantaks-fíggjarlóg hevur tí havt tveir einfaldar setningar:

At fáa tamarhald á útreiðslunum, steðga meirnýtsluni og tálma ófíggjaðu samtyktunum frá valárinum.

At seta í verk summar av teimum politisku raðfestingum, sum nýggja samgongan hevur sett sær sum greið mál.

Nýggjur politikkur hart útvaldur

Nýggju tiltøkini á fíggjarlógini hjá hesi samgonguni eru avmarkað til áleið 23 mió. krónur, og tær fara fyrst og fremst til útbúgving, umhvørvi, útlendingamál, uttanríkismál og stakar uppihaldarar.

Tað merkir sjálvsagt, at tey, ið høvdu ynskt at sæð øll tey stóru málini í samgonguskjalinum aftur í hesi uppruddingarfíggjarlóg, fara at koma við hvøssum atfinningum.

Og tí skulu vit ikki renna undan. Tað hevur verið neyðugt at valt rættiliga hart burturúr á hesi fíggjarlógini.

Tildømis hava vit á útbúgvingar-, mentanar og granskingarøkinum valt hægri útbúgvingarnar á Fróðskaparsetrinum fremst, umframt fleiri lærara- og námsfrøðilesandi, har allar kunnu byrja í heyst. Meðan gransking og mentan bert hava fingið smávegis hækking – og verða sett veruliga á fíggjarlógina fyri 2009.

Stórar broytingar kortini

Hóast sera trupul val orsakað av fíggjarligu avbjóðingunum, so eru sera grundleggjandi broytingar og greið mál longu framd hesar góðar tveir mánaðir, nýggja stjórnin hevur sitið. Bert fyri at nevna nøkur mál, ið eru framd ella partur av fíggjarlógini:

Stakir uppihaldara fáa dupult barnaískoyti

Fleiri heilt nýggjar útbúgvingar byrja á Fróðskaparsetrinum (helst størsta broyting innan hægri útbúgving í Føroyum)

-Útlendingamálið fær bráðfeingis loysn og verður tikið heim

-Tilboð til lesiveik í fólkaskúlanum umframt tilboð til børn við atferðartrupulleikum

-Barsilsskipanin betrað

-Íløgur í millumbylgjusendara (ligið á láni í áravís)

-Lóg um setanarbærv fyri tímalønt

-Tiltøk til at stimbra íverksetan og útflutningsframa

-Nýggj bústaðartilboð til sinnisveik

-Samtykt um Marknagilsdepil

-Umhvørvistiltøk

-Nýggjur tilfeingispolitikkur

Nógv størri avbjóðingar fyri framman

Hetta eru tó kámar endurspeglingar av teimum ætlanum og avbjóðingum sum skulu loysast fyri føroyska samfelagið komandi árini.

Orku- og umhvørvispolitikkur; hækkandi oljuprísurin; at gera okkum leys av blokkstuðlinum; at stovna Búskapargrunn; føroysk stjórnarskipan og rættartrygd; altjóða virkisføri og handilsavtalur; nýggir vinnumøguleikar; verulig tiltøk fyri gransking og mentan; størri kommunur og útjavningarskipan; ójavnarnir minkast millum økini í landinum og millum samfelagsbólkar; og langtíðaríløguætlanir.

Tað eru tey málini, ið øll orka skal setast til, nú fyrsta uppruddingin er fingin frá hondini.

Tað hevði sømt seg, at allir flokkar fóru at taka hesar avbjóðingar fremst, heldur enn at renna undan ábyrgdini fyri egnum mistøkum.